MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Einalærarar í Fámjins Skúla og Haraldssunds Skúla

Hevur tú hug at royna teg sum einalærara, so er møguleiki at søkja einalærarastarv í Fámjins Skúla og Haraldssunds Skúla. Størvini eru tíðaravmarkað skúlaárið 2017/18.

**Um starvið**

Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans. Hann hevur sjálvur alla undirvísingini í skúlanum og hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Einalærarin skal fremja gott samstarv millum skúla og heim og virka fyri, at næmingarnir trívast og fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalærara-útbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av prógvi, c.v. og øðrum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2017.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**:** **mmr@mmr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*